BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

28. januar 2026
Mál: 22/22133-152
Viðgjørt: HW

Svar

upp á

skrivligan fyrispurning nr. 52-078/2025, eftir § 52a í Tingskipanini, frá Jenisi av Rana, løgtingsmanni, settur Djóna Nolsøe Joensen, landsstýrismanni í barna- og útbúgvingarmálum, um Holocaustdagin.

Spurningurin er soljóðandi:

1. Verður altjóða Holocaustdagurin hildin í føroyska undirvísingarverkinum hin 27. januar í ár?
2. Um tiltakið ikki verður hildið sum vanligt, hvør er so orsøkin til hetta?

Svar

Til 1: Ja, altjóða Holocaustdagurin verður hildin hin 27. januar í ár.

Dagurin er ásettur sum almennur minningardagur við løgtingssamtykt frá 2019, og virkað verður fyri, at allir fólka- og miðnámsskúlar arbeiða við evninum Holocaust henda dagin.

Í ár verður dagurin skipaður øðrvísi, har dentur er lagdur á, at skúlarnir sjálvir arbeiða við evninum. Nám hevur í hesum sambandi savnað og gjørt viðkomandi undirvísingartilfar um Holocaust og onnur fólkadráp. Tilfarið er lagt á undirvísingarportalin Snar og er tøkt hjá bæði fólka- og miðnámsskúlum.

Til 2: Nám hevur árini frammanundan skipað fyri tiltøkum í sambandi við Holocaustdagin, men Nám røkkur ikki øllum næmingum á sama hátt sum skúlarnir, og tí verður henda royndin gjørd í ár, men framvegis við áherðslu á at veita kunnleika um Holocaust og fólkadráp.

Umráðandi er, at skúlarnir skipa undirvísing um Holocaust, soleiðis at so nógvir næmingar, sum til ber, ogna sær innlit í evnið.

BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

Tað hevur stóran týdning, at vit sum skúlaverk varpa ljós á Holocaust og fólkadráp, soleiðis at vit sum menniskju og samfelag læra av søguni, og økja um tilvitið og fatanina av teimum ræðuligu avleiðingum, sum kunnu standast av kríggi, ótolsemi og fordómum.

Vinarliga

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður

J. H. Schrøtersgøta 7 • FO-100 Tórshavn • Tel: +298 306500 • bumr@bumr.fo